# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá kæri pápi, verfaðir og abbi okkara

**Ansvein Heinesen**

brádliga andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til vil jarðarferðina og fylgdu Ansvein til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Bogi, Gunnvá og Katrina**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara kæri pápi, verpápi og abbi

**Jørgen Edmund Samuelsen**

ættaður úr Sumba og búsitandi í Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til tykkum á Lágargarði fyri umsorgan og røkt, meðan hann búði hjá tykkum.
Tøkk til tykkum á Landssjúkrahúsinum, sum vóru um hann har.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, berarar, sangarar, gravarar og til tykkum, ið hjálptu til og fyriskipaðu ervið.
Tøkk fyri heilsanir, uppringingar, vitjanir, bakstur, blómur, kransar og gávur til Lágargarð.
Tøkk øll tit mongu, ið fylgdu honum til síðsta hvíldarstaðið.
Skyldfólk, vinir og kenningar, hjartans tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*

**Hervør, Regin, Birgir og Finnbogi**

**Dagurin**

**28. juni. Eleonora**. Nú á døgum stendur í álmanakkanum bara Karolina Amalia, sum er navnið á eini drotning, og sum er komið inn í álmanakkan, eftir at teir í 17. øld gjørdu av at seta føðingardagarnar hjá kongum og drotningum við dagarnar í álmanakkanum. Men henda Karolona Amalia er eingin halgikona heldur enn onnur kongilig. Fyrr stóð navnið Eleonora, men satt at siga vita vit einki um, hvør ið hon var. Navnið er tað sama sum Helena.

**29. juni. Pætursøka**. Tíðliga í fornkirkjuni varð 29. juni hildin til minnis um, at bæði Pætur og Paulus vórðu tiknir av døgum henda dag, Pætur krossfestur við høvdinum niðureftir, helst í árinum 64, og Paulus hálshøgdur, helst í árinum 67. Dagurin var upprunaliga bæði ein pætursøka og ein pálsmessa.

**30. juni. Lucina**, deyð umleið ár 100. Kristin kona, sum sigst at hava verið upplærd av ápostlunum sjálvum. Annars er dagurin eisini ein av pálsmessunum.

# 25 námsfrøðingar afturat

**Ein heilur flokkur av sjálvlesandi føroyskum námsfrøðingum fekk í dag prógv á Dannerseminaret í Danmark**



Tey 25 hava øll tikið lut á netlesnaðinum hjá Dannerseminaret, sum liggur í Jægerspris nakað norðanfyri Keypmannahavn. Skúlin heldur til á søguliga slottinum, sum Fríðrikkur sjeyndi hevði saman við konu síni, greivinnu Danner. Harav navnið á skúlanum.

Føroyski bólkurin hevur verið í Danmark hesa seinastu lítlu vikuna, har tey hava vart høvuðsuppgávur sínar, og hvør sum ein stóðu tey seg somikið væl, at prógvið varð handað.

Tey 25 eru: Gunhild Arge, Laila Skála Askham, Heidi Holm Dahl, Elin Debes, Eyðvør Egholm, Ingrid Fuglø, Linda Hammer, Eyðbjørg Hansen, Sóleyð Debes Joensen, Jóan Petur Ingemar Johansen, June Jónsveinsdóttir, Marion Leifsdóttir, Elin Mikkelsen, Hansy Mouritsen, Petrina Nolsøe, Jørgin Evert Olsen, Eyð Unadóttir Persson, Elspa Petersen, Marjun Petersen, Katrin Signa Poulsen, Nancy Petsy Selfoss, Susan Vibeka Tavsen, Annika Vestergaard, Súsanna Guðrið Dam og Mathilda Dam Lamhauge, sum tó vantar á myndini.

# Maria Guttesen á Reinsarínun

Týskvøldið 1. juli spælir Maria Guttesen á Reinsarínum í Havn.

Talan er um fyrstu konsertina Maria Guttesen hevur í Føroyum, eftir at fløgan ”Wide Open” kom út fyrr í ár. Hendan útgávan er heilt serlig, tí tað er Maria sjálv, sum spælir øll ljóðføri á útgávuni. Hetta verður tó einasta konsertin hjá Mariu Guttesen í Føroyum á hesum sinni. Við sær á pall hevur hon bróðirin Gunnar G. Guttesen á trummum og danska Peter Steenild á guitar.

Ummælarar hava róst Mariu Guttesen seinastu árini, og hevur hon eisini fingið góð ummæli í samband við ”Wide Open” fløguna. Føroyska songkvinnan, tónleikarin og tónasmiðurin hevur gjørt meira og meira vart við seg. Hon er ring at seta í bás, men verður tó samanbordin við t.d. Tinu Dickow, Bjørk og Anisette, av ummælarum í Danmark.

Í løtuni fæst Maria við eina fløguinnspæling saman við guitarsnillinginum Peter Steenild, sum eisini fer at framføra við henni týskvøldið og verður hendan útgáva væntandi liðug seinni í ár.

Konsertin verður týskvøldið 1.juli kl. 20.00, og atgongumerkir á 100 kr fáast í Kunningarstovuni og við dyrnar.

Les meira um Mariu á myspace.com/mariaguttesensolo ella mariaguttesen.dk

